**UTTAN ÚR HEIMI**

## Trýr ikki irakum

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, er als ikki sannførdur um, at irakar eru í ferð við at oyðileggja síni hópoyðingarvápn. Rætt er tað, at teir hava oyðilagt nakrar av teimum ólógligu rakettunum seinastu vikuna, sigur Powell, men hann sigur seg vita, at irakar samstundis royna at gera nýggjar rakettir.

Í einari røðu fyrrakvøldið segði Powell, at amerikanska fregnartænastan hevur fingið fatur á upplýsingum, sum benda á, at irakar ætla bert at oyðileggja ein part av útgerðini, sum verður nýtt til at gera tær ólógligu rakettirnar. Hitt fjala teir, segði hann.

Colin Powell endurtók, at ósemjan innan altjóða samfelagið um, hvussu Irak-kreppan skal loysast, er bert til fyrimunar fyri Saddam Hussein, sum fær uppaftur betri møguleikar at halda umheimin fyri gjøldur.

## Kanna deyðsføll

Amerikansku hernaðarmyndugleikarnir í Afghanistan eru farnir at kanna, hví tveir fangar, sum sótu í varðhaldi hjá amerikanska hervaldinum har, doyðu.

Ein talsmaður hjá herleiðsluni sigur, at teir báðir fangarnir vóru í varðhaldinum á amerikansku herstøðini í Bagram. Amerikanskir fjølmiðlar vilja vera við, at menninir doyðu, eftir at teir høvdu fingið ringa viðferð í fangaleguni.

Talsmaðurin hjá herleiðsluni sigur, at tíðindini í fjølmiðlunum verða tikin við í kanningarnar.

## Burtur við stuðuli

ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, vil hava tey ríkastu londini í heiminum at strika stuðulin til landbúnaðin.

Annan kom við áheitanini á einum fundi við umboð fyri londini í G8-bólkinum, sum eru USA, Russland, Frakland, Bretland, Týskland, Kanada, Japan og Italia. Tey átta londini hava skipað ein bólk, sum skal umrøða, hvat kann gerast fyri at bøta um viðurskiftini hjá landbúnaðinum í pørtum av Afrika, har umleið 30 milliónir fólk eru hótt av hungursneyð.

- Tey ríku londini mugu leggja størri dent á at menna landbúnaðin, bøta um heimsmarknaðin og herða bardagan ímóti eyðkvæmi, sum drepur nógvar bøndur í Afrika, segði Kofi Annan á fundinum. Hann segði, at skal landbúnaðurin í Afrika hava ein møguleika á altjóða marknaðinum, mugu tey ríkastu londini strika almenna stuðulin til sín landbúnað. Sum er er hesin stuðul oman fyri 2100 milliardir krónur um árið.

## Mismæltur forsætisráðharri

Kinesiski forsætisráðharrin, Zhu Rongji, var av sonnum mismæltur, tá hann helt sína seinastu røðu á landsfundinum hjá kommunistaflokkinum mikudagin.

Tað var í tí partinum av røðuni, sum snúði seg um samstarvsmøguleikarnar millum Kina og Taiwan, sum kinesiska leiðslan framvegis roknar sum ein part av ríkinum, at Rongji var mismæltur.

- Vit eiga at bøta um møguleikarnar hjá fólki í teimum báðum londunum at vitja hvør annan, segði Rongji, men skundaði sær at skoyta orðini "báðu megin Taiwan-sundið" upp í setningin. Taiwanski forsetin, Chen, segði í august í fjør, at Kina og Taiwan eru tvey sjálvsstøðug lond. Hesi orðini fullu ikki í góða jørð í Beijing og elvdu alt fyri eitt til spenning millum tær báðar stjórnirnar.



*Spreingingin var so sterk, at lítið var eftir av bussinum.*

# So melur skrúvan aftur

**Tann endaleysa skrúvan í Miðeystri er aftur farin at mala. Fyrst brast ein sjálvmorðsbumba í Haifa, og gjáranáttina hevndi Ísrael atsóknina. Úrslitið var 26 deyð.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Eftir steðg í tveir mánaðir eru sjálvmorðsbumbuatsóknirnar byrjaðar aftur í Miðeystri. Tað hendi seinnapartin mikudagin, tá ein palestinskur bumbumaður fór upp í ein buss í ísraelska havnarbýnum Haifa og sprongdi eina sterka løðing.

Spreingingin var so sterk, at tað mesta av takinum fór oman av bussinum, og tá ísraelsku hjálparfólkini vóru liðug á staðnum, høvdu tey flutt 15 lík haðani. Harumframt høvdu fleiri fingið skaða, og hjá summum stóð um lív.

Eins og fyrr kom ísraelska hevndin at kalla beinanvegin. Gjáranáttina søkti ísraelski herurin at einari flóttafólkalegu uttan fyri Gaza bý. Stríðsvognar skutu granatir og tyrlur rakettir, og tá avtornaði, høvdu 11 palestinar latið lív í álopinum. Uppaftur fleiri vóru særd.

Í gjár hevði eingin palestinskur felagsskapur átikið sær ábyrgdina av bumbuspreingingini í Haifa, men Yaacob Borowsky, løgregluovasti, segði longu stutt eftir tilburðin, at talan var um eina palestinska sjálvmorðsbumbuatsókn. Sambært ovastanum hevði ísraelska løgreglan fingið einar 40 ábendingar um, at ein atsókn var á veg.

Palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir fordømdu atsóknina í Haifa, sum var tann fyrsta síðani tann 6. januar.

# Høgra hond hjá Sjakalinum fyri rættin

**Johannes Weinrich, sum einaferð varð mettur at vera heimsins vandamesti drápsmaður, er nú fyri rættinum í Týsklandi.**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen:*

Johannes Weinrich sýtti fyri at úttala seg, tá hann fyrradagin møtti í rættinum í Berlin, har hann er ákærdur fyri seks morð og fleiri hundrað morðroyndir fyri meiri enn 20 árum síðani. Tann 55 ára gamli Weinrich situr longu í fongsli, har hann er dømdur at sita alt lívið.

Málið er kortini ikki nyttuleyst, heldur týski ríkisákærin, sum hevur sett sær fyri at fáa eina endaliga uppgerð við ta yvirgangsalduna, sum Johannes Weinrich skipaði fyri í 1970-unum og 1980-unum í Evropa saman við Iljitsj Ramirez Sanchez, sum man vera betri kendur undir heitinum "Carlos" ella "Sjakalurin".

Weinrich var umboðsmaður hjá Sjakalinum í Evropa. Hann hevði ein bókahandil í Frankfurt, har hann javnan hitti umboð fyri víðgongdar vinstrasinnaðar felagsskapir, áðrenn hann fór upp í yvirgangsfelagsskapin Rote Arme Fraktion.

Tey seks morðini, sum hann nú er ákærdur fyri, stava frá einari bumbuatsókn í París í 1982, tá ein kvinna doyði, og einari atsókn ímóti einari jarnbreytarstøð í Marseille nýggjársaftan í 1983, tá fimm fólk doyðu.

Umframt morðini er Johannes Weinrich ákærdur fyri at hava roynt at skjóta eitt ísraelskt ferðamannaflogfar niður við einari rakett í París í 1975.

Ein atsókn, sum eisini er í ákæruritinum, er bumbuatsóknin at útvarpsstøðini Radio Free Europe í Múnchen í 1981. Hetta málið er kortini eitt sindur viðkvæmt, tí týska ákæruvaldið vil vera við, at tað var rumenska fregnartænastan Securitate, sum bílegði atsóknina, og sum rindaði Weinrich samsýning fyri hana.



**NØVN Í VIKUNI**

## Gullbrúdleyp í Kirkjubø

Leygardagin 1. mars kundu hjúnini, Elisabeth og Sámal Patursson halda gullbrúdleyp.

Elisabeth er fødd Frederiksberg og ættað av Strondum. Sum ung kom hon til Havnar at tæna og arbeiddi síðani á telefonstøðini eitt skifti.

Alt teirria lív saman, hava tey fingist við urtagarðsbrúk í Kirkjubø. Urtagarðsarbeiði hevur bæði verið teirra livibreyð og stóra áhugamál.

Hóast aldurin, 80 og 86 ára gomul, eru tey bæði tvey virkin fólk.

Tey fáast enn við urtagarðsarbeiði, og inni í Dølunum veltir Sámal epli, røtur og grønmeti. Eisini hevur hann seyð har. Enn bindur hann kransar fyri blómuhandlar kring landið, og við hvørt koyrir hann sjálvur til Havnar við kransum.

Elisabeth er ein kona av tí góða gamla slagnum, sum hevur bundið eitt ótal av pløggum til børn og ommubørn. Mangur hevur sitið væl við hennara borð og notið kendu rabarbukøkuna, kallað kirkjubøarkaka.

Elisabeth og Sámal eru serstakliga gestablíð og teirra heim hevur altíð verið opið fyri bæði kendum ókendum. Tey eru sera umhugsin fólk og ganga høgt uppí at gleða fólk til føðingardagar og merkisdagar.

Eyðkent fyri tey er teirra hjartalag fyri teimum, sum eru einsamøll og ongan góðan eiga. Ikki so fá blómuprýði hava tey koyrt út til familju og onnur, sum tey vildu gleða.

Elisabeth og Sámal eiga børnini, Rasmus, Fríðu og Svein. Gullbrúðardagin hugnaðu tey sær í Sørvági saman við børnunum.

**r.s.**



*Seinasta leygardag kundu hjúnini, Elisabeth og Sámal Patursson í Kirkjubø, halda gullbrúdleyp*

## Sjón fyri søgn

Mikudagin fylti Peter Jóhannes Eliasen í Klaksvík 30 ár. Tað ætlaðu vinmenn hansara ikki, at hann skuldi sleppa at lúgva seg burturúr. Teir settu stórt skelti á húsini, sum standa mitt í býnum, beint omanfyri kirkjuna.

Peter er sonur Elsu Mariu og Peter Ova Eliasen. Hann eg giftur okkara fittu blaðkvinnu, Solby, og eiga tey synirnar, Petur Martin og Kristian. Teir eru eitt og trý ára gamlir.

Petur er útlærdur bakari og arbeiðir á bakarínum hjá Jórun. Í frítíðini spælir hann sjónleik og horn.

**r.s.**




*Vinmennirnir hjá Peter spældu honum eitt puss mikudagin, tá teir syrgdu fyri, at øll bygdin frætti um tríatiára føðingardagin. Men piparsveinur er hann ikki. Hann er væl og virðiliga giftur og eigur tveir elskuligar synir*

## Pól Jákup Poulsen á Runavíkar Sjómansheim

1. mars tók Pól Jákup Poulsen av Strondum við sum fyristøðumaður á Runavíkar Sjómansheimi. Poul Jákup er 27 ára gamal og uppvaksin í Lamba. Hóast hann hevur verið nógv á Runavíkar Sjómansheimi, er hetta ein nýggj og spennandi uppgáva hjá honum. Hann heldur at arbeiðið er spennandi og avbjóðandi. Ein týðandi uppgáva hjá honum er at seta seg í samband við fyritøkurnar í Eysturoynni og fáa tær at brúka heimið til starvsfólkaskeið og annað. Tey kunnu gista og hava undirvísnig á sama stað. Sjómansheimið hevur 15 dupultkømur og 4 einakømur við øllum hentleikum. Teir gera eisini mat til føðingardagar, konfirmationir o.a. uttanfyri húsið. Umframt at starvsfólkið hevur andakt hvønn morgun er eisini andakt týskvøld.

*Kelda og mynd: Trúboðin*



## Karin Hammer 50



6. mars varð Karin Hammer fyrstilærari í Kollafirði 50 ár. Karin er dóttir Tóra Zachariasen úr Hesti og Esther, f. Thorsteinsson, úr Trongisvági. Hon tók lærarapróg á Føroya Læraraskúla í 1979 og var lærari á HF-skeiðum í Hoydølum frá 1979-80. Síðan 1980 hevur hon verið lærari við Kollafjarðar Skúla, har hon síðan 1998 hevur verið fyrstilærari. Umframt fleiri ymisk skeið hevur hon tikið 1. og 2. part av serlæraraútbúgving. Karin er gift við Kajfinn Hammer úr Hovi. Tey hava búð í Kollafirði síðan 1979 og eiga 3 børn, tveir synir og eina dóttir.

**mg**

## Niels Juel Arge fíggjarleiðari hjá PM heilsølu

1. januar varð Niels Juel Arge settur sum fíggjarleiðari hjá Poul Michelsen heilsølu í Havn. Niels Juel er 37 ára gamal og havnarmaður. Eftir lokið studentsprógv lærdi hann til bankaatstøðing í Føroya Banka. Eftir tað arbeiddi hann í 3 ár á grannskoðaravirkinum hjá Paula Ellefsen, áðrenn hann fór til Danmarkar at lesa til búskaparfrøðing. Í 1999 tók hann Tillægsuddannelsen á Danmarks Journalisthøjskole. Hann arbeiddi í 3 ár í Fíggjarmálaráðnum áðrenn hann kom til Poul Michelsen heilsølu. Niels Juel hevur eisini undirvíst í virkisbúskapi á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.



**mg**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2